Sosialurin



# Starvsmannafelagið krevur hoyringsskrivini afturtikin

SELMA ELLINGSGAARD
Forkvinna



**Soljóðandi skriv varð 02.01.09 send leiðslu Kringvarpsins og síðani eisini Kringvarpsstýrinum og landsstýriskvinnuni í mentamálum**

Starvsmannafelagið krevur, at Kringvarpið tekur aftur øll hoyringsskrivini, sum vóru latin teimum sjey limunum hjá Starvsmannafelagnum 16. desembur 2008.

Kravið er grundað á, at kringvarpsleiðslan ikki hevur haldgóðar grundgevingar fyri ætlaðu uppsøgnunum.

Samstundis sum ætlanarskriv um uppsøgn verða viðgjørd, hevur Kringvarpið valt at seta nýtt fólk í starv, hóast skikkað fólk eru millum tey, ið ætlanin er at siga úr starvi.

Kringvarpsleiðslan hevur ført fram, at uppsagnirnar gjørdust neyðugar orsakað av brádliga íkomnum tørvi á sparingum í 2009, hon mátti tí siga dugnaligum fólki farvæl.

Men tað er Starvsmannafelagsins greiða fatan, at ongin orsøk er at siga nakran úr starvi orsakað av sparingum í 2009. Sparingarnar orsakað av uppsøgnum av limunum hjá Starvsmannafelagnum eru í 2009 góð hálv millión krónur. Hetta tí øll hava langa uppsagnarfreist og frítíð til góðar. Tey flestu fáa tí løn til og við septembur.

Tilsamans er talan um gott eitt ársverk, sum verður spart burtur í árinum.

Um tvey av teimum, ið hava fingið hoyringsskriv, valdu at fara niður í hálva tíð í 2009, og Kringvarpið ikki setti nýtt fólk, men umrokerar á stovninum, so sparir stovnurin tvey ársverk uttan uppsagnir. Stovnurin kundi tá sloppið undan tí harðrendu framferðini mótvegis starvsfólkunum á stovninum og tikið sær stundir til at lagt eina skilagóða ætlan fyri tillaging av búskapinum í samráð við eitt nú Mentamálaráðið.

Starvsmannafelagið heitir tí á leiðsluna um at taka aftur ætlanarskrivini. Starvsmannafelagið býður sær saman við starvsfólkunum á stovninum og leiðsluni at finna ein leist fyri ætlaðu sparingum uttan at siga fólki úr starvi.

Í øðrum umfari heitir Starvsmannafelagið á stýrið fyri Kringvarpið og Mentamálaráðið um at tryggja starvsfólkunum í Kringvarpinum eina virðiliga viðferð, at sømuligur starvsfólkapolitikkur verður rikin innan tað almenna, og at ætlanarskrivini um uppsøgn verða afturtikin í stundini.

----

Á fundi í dag við leiðslu Kringvarpsins hevur Starvsmannafelagið tvíhildið um, at í sambandi við setanina av journalisti nýggjaftan, hevur leiðslan fyri Kringvarp Føroya brotið ásetingarnar í sáttmálanum, at størv skulu lýsast leys alment og eisini almenna setanarpolitikkin.

Lýsingin hevur bert staðið á heimasíðu Kringvarpsins og er hetta ikki nøktandi lýsingarháttur.

Eisini hevur leiðslan brotið bæði sáttmála og almenna setanarpolitikkin, í mun til at álitisfólk skal hava málið til ummælis, áðrenn endalig støða verður tikin og sum partur av setanarbólkinum skal vera við í setanartilgongdini og er hetta ikki farið fram.

Orðingin í almenna setanarpolitikkinum er henda:

"Setanarnevnd verður sett at meta um umsøkjarar, viðgera umsóknir og hava setanarsamrøður. Í setanarnevndini skulu verða umboð fyri leiðslu og starvsfólk, t.d. umboð fyri ávísar starvsbólkar, ið viðkoma starvsøkinum, og álitisfólk.

Tað er av stórum týdningi, at setanarnevndin er umboðað við fólki, sum hevur førleika at meta um umsøkjarar, tá talan t.d. er um starv, ið krevur serligan fakligan førleika.

Góð tíð skal verða sett av til at viðgera umsóknirnar."

Starvsmannafelagið góðtekur als ikki hesa framferð og hevur kravt at setanin verður ógildað.

Leiðslan vil ikki ógilda setanina og Fíggjarmálaráðið metir ikki, at hetta er so álvarsamt brot, at avleiðingin er ein ógildan av setanini.

Starvsmannafelagið og hini fakfeløgini í fakfelagssamstarvinum á almenna arbeiðsmarknaðinum: Akademikarafelag Føroya, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Felagið føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Havnar Arbeiðskvinnufelag eru samd um, at hetta mál er av sera principiellum týdningi.

Vit góðtaka ikki at sáttmálaásetingar verða brotnar og at hetta ikki fær avleiðingar!!

Vísandi til skrivið, ið sent varð leiðsluni og avvarandi myndugleikum, so er grundgevingin fyri at limir okkara hava fingið hoyringsskriv um uppsøgn ógrundað.

Sparingin er so lítil, at er vilji at troyta allar møguleikar at fyribyrgja uppsagnunum, herundir m.a. møguleikarnar fyri niðursettari tíð og gagnnýta ásetingarnar um eldrapolitikkin í sáttmálanum og ikki at seta leysa starvið, so er als ikki neyðugt við uppsagnum.

Tað er eisini follið fakfelgssamstarvinum fyri bróstið, at ikki allar royndir at fyribyrgja uppsagnum eru troyttar, við virðing fyri teim starvsfólkum, ið hava tænt Kringvarpinum í mong ár.

Kringvarpið tolir als ikki fleiri starvsfólkaskerjingar.

Við hesum grundgevingum heitir Starvsmannafelagið enn einaferð staðiliga á leiðslu Kringvarpsins at taka ógrundaðu hoyringsskrivini aftur.

# Føroysk Miðlafólk verja sínar limir

ANNA V. ELLINGSGAARD
forkvinna,
vegna nevndina í
Føroysk Miðlafólk



Tað tykist sum ein stak illa umhugsað krígsavbjóðing, at Starvsmannafelagið nú krevur, at Kringvarpið nú skal strika starvssetanina av einum journalisti, sum er limur í fakfelagnum Føroysk Miðlafólk.

Føroysk Miðlafólk vara ikki av sjálvum sáttmálanum, sum journalistar og onnur programmfólk verða starvssett eftir í Kringvarpinum. Men tó skal tað standa púra greitt, at felagið undir ongum umstøðum fer at góðtaka, at nýggjasta starvssetanin av einum journalisti, sum er limur í Føroysk Miðlafólk, á sjónvarpsredaksjónini á tíðindadeildini verður strikað.

Føroysk Miðlafólk hava longu mótmælt uppsøgnunum, sum ætlanarskriv eru send út um, og felagið stendur fult út við sítt mótmæli. Felagið heldur uppsagnirnar skaða tað journalistiska fakið, tí næstan øll tey, ið ætlanin er at siga úr starvi, eru beinleiðis tengd at journalistisku framleiðsluni.

Men ætlaðu uppsøgnirnar hava als onki við nýggjastu starvssetanina á tíðindadeildini at gera, og tí mótmæla vit harðliga, at Starvsmannafelagið blandar hesi málini saman og tilvitað gruggar tey. Úrslitið kann einans verða, at starvsfólk í Kringvarpinum á henda verða sett upp móti hvør øðrum.

Føroysk Miðlafólk hava kannað umstøðurnar og niðurstøðan er greið:

Starvið á sjónvarpsredaksjónini, sum varð sett beint fyri nýggjár við virknaði frá 1. februar, varð lýst leyst á heimasíðuni hjá Kringvarpinum, áðrenn tað nakrantíð var upp á tal at siga fólki úr starvi á stovninum.

Starvið varð lýst leyst, tí ein sera sentralur medarbeiðari í november segði seg úr starvi. Um sjónvarpsredaksjónin skuldi vera arbeiðsfør, var tað sera umráðandi, at nýtt fólk við hollum journalistiskum royndum og royndum innan sjónvarp varð sett í staðin sum skjótast.

Tað er tað, sum er hent.

At málið við uppsøgnunum so stingur seg upp, stutt eftir at starvið á sjónvarpsredaksjónini longu var lýst leyst, er púra tilvildarligt. Øll hava havt møguleika at søkja hetta starvið – eisini fólk í øðrum størvum í Kringvarpinum, íroknað tey, sum hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn.

Hetta málið ella hesi málini undirstrika bert enn einaferð, at Starvsmannafelagið ikki skilir, hvussu eitt journalistiskt arbeiðspláss virkar og enn minni, hvat journalistiska fakið er – millum annað at fakið og arbeiðsøkini eru spesialiserað, soleiðis at ofta krevjast serligir førleikar til serligar uppgávur.

Tað er bert náttúrligt, at Føroysk Miðlafólk, sum er einasta felag, ið burtur av virkar fyri journalistiska fakið, nú fer at herða strembanina eftir at fáa sáttmála fyri sínar limir í Kringvarpi Føroya.

Tískil mæla vit eisini staðiliga okkara limum í Kringvarpinum til at tekna seg úr øðrum fakfeløgnum.

# Misskilt nationalisma

HERGEIR NIELSEN



Av og á síggja og hoyra vit um hugtakið "misskilt nationalisma."

Alt tað, ið danskt er, er av tí ónda, tá tú ert fongdur við misskiltari nationalismu, verður sagt.

Hinvegin, so ert tú bæði heilur og sælur, um tú tekur av øllum, sum danskt er, og sagt verður, at landsstýrið ger tað einasta rætta við at leggja Bankapakka II fyri tingið sum skjótast.

Hóast danir í skrivandi løtu als ikki eru samdir, og framvegis dystast um, hvussu teir skulu pakka Bankapakka II, so siga teir okkara, sum ongantíð halda seg misskilja nakað av nøkrum sum helst, at vit skulu í sama pakka sum danir, uttan mun til hvussu pakkin annars sær út.

Í Onglandi eru royndirnar tær, at bankapakkarnir onga effekt hava. Hóast bankarnir har hava fingið stórar innspræningar, so lata teir kortini lítið og einki frá sær, hvørki til privat ella vinnulív.

Bank of England sigur, at ensku bankarnir eru blivnir enn meiri afturhaldandi í útlánspolitikki teirra aftan á fyrsta enska bankapakkan upp á 4.000 mia. kr.

Í Danmark er ivin eisini stórur millum leik og lærd. Onkur serfrøðingurin heldur, at danski staturin sjálvur eigur at keypa ein banka, og síðan læna pening út.

Kanska er tað líka frægt at eiga ein banka, sum at eiga nakað í øllum bankum, so sum gjørt var við tí fyrsta bankapakkanum.

Eingin trygd er fyri, at ein nýggjur bankapakki fær neyðugu ávirkanina, og royndirnar eru tær somu, sum í Onglandi.

Hildið verður frá danskari síðu, at donsku politikararnir ikki hava gjørt neyðugu kanningarnar, ið lýsa tørvin á einum nýggjum bankapakka.

Lagaligi útlánspolitikkurin er komin fleiri bankum afturumaftur, og hildið verður, at eingin orsøk er til, at tað almenna skal tryggja hesi útlán frameftir.

Her hjá okkum er politiska støðan enn verri. Sjálvur løgmaður sigur seg hava frætt, at ein bankapakki er á veg, men at hann ikki hevur ánisli av, hvat ið er í hesum pakka, sum kortini skal leggjast fyri tingið.

Rímiligt er nú at spyrja, hvør ið er nú fongdur við hvørjum?

Í Visjón 2015, komu strategibólkarnir hjá undanfarnu ABC-samgongu til somu niðurstøðu í 2007, sum Tjóðveldisflokkurin kom til í 1948.

Teir søgdu, at "størstu forðingarnar í altjóðagerðini eru stjórnarrættarligu viðurskifti okkara, ið eru ein avmarking, tá ið tað ræður um limaskap í ymiskum millumtjóða felagsskapum."

Á høgra bredda nakað niðanfyri miðjuna á síðu 20 taka teir uppaftur: "Formligu viðurskifti Føroya við danska ríki eru størsta einstaka forðingin fyri, at Føroyar sum land kunnu luttaka á jøvum føti við onnur lond."

Sum skilst, so koma vit ikki á føtur, um alt tað potentiali, sum kann geva føroyska samfelagnum ein størri búskaparvøkstur, liggur fjøtrað undir donskum valdi.

Hetta einvegis og fjøtrandi sambandið kostar okkum ov nógv á inntøkusíðuni, og enn eina ferð verða vit mint á, at vit eru í lummanum á tí, sum vit fáa lummapening frá.

Fylgja vit teimum skuldsetandi føroysku politikarunum, so síggja vit, at strategibólkarnir hjá tí almenna mugu vera bitnir av somu misskiltu nationalismu, sum fullveldisfólk eru bitin av.

Meðan embætisverkið og ein partur av politiska landslagnum heldur, at lykilin til altjóða menning liggur í føroyskari luttøku og sjálvstøðugum føroyskum limaskapi á flest møguligum økjum, so heldur annar parturin alt vera sára gott, um bert danir taka sær av flest øllum føroyskum áhugamálum.

Harafturat er tolsemið so avmarkað, at alskyns ókvæmisheitið verða heft á tey, sum vilja virkað eftir egnum fortreytum. Eitt nú verða tey kallaði nationalistar í negativari merking.

Ikki so lítið bendir á, at tey sum rópa harðast um misskilta føroyska nationalismu, eru meiri fongd av danskari nationalismu, enn danir sjálvir eru.